r:

# tvørtur um floksmørk



*Hópur av fólki var til hátíðarhaldið í Kalsoynni týsdagin*

*Mynd: Bárður Lydersen*

bygdi fyrstu atløgubryggjuna á Húsum, og hann stóð eisini fyri arbeiðnum, tá ið nýggjar atløgubryggjur vórðu bygdar á Húsum í 1947-1948 og á Syðradali í 1950-1951. Atløgusíðan á Syðradali varð útbygd í 1970-unum og hevur seinastu árini verið nýtt til farma-og ferðafólkaflutning millum Kalsoynna og Klaksvíkina.

- Eg vænti, at tit geva mær rætt, tá ið eg sigi, at besti hátturin at hátíðarhalda hetta 75-ára jubileum er við eini spildurnýggjari samferðsluhavn, sum nú er klár at taka í nýtslu, segði Bjarni Djurholm.

## Siglingarsøgan

Strandfaraskip Landsins hava avgjørt, at Sam framyvir skal røkja siglingina í Kalsoynna.

- Sam verður sostatt nýggjasta skipið í eini røð av skipum og bátum, sum hava røkt sambandið í Kalsoynna. At menningin av samferðsluni hevur gingið skjótt, er Kalsoyggin besta dømi um, segði landsstýrismaðurin.

Hann vísti á, at tað er ikki meira enn ein mansaldur síðan, at róð varð við árabáti í oynna við posti, farmi og ferðafólki.

Bjarni Djurholm greiddi síðan frá, hvussu gongdin við flutningi hevur verið seinastu mongu árini.

- Í 1927 keypti Samson Joensen, ið var postmaður og sum róði í Kalsoynna og gekk norður um Fjall, deksbátin Guttaberg. Báturin hevði motor og sigldi týsdag, hósdag og leygardag millum Klaksvíkina, Kunoyarbygd og Kalsoynna við posti, farmi og ferðafólki.

Hann vísti á, at í 1948 yvirtók P/F Hugo Gardar siglingina, fyrst við Leynafossi, síðan við Polaris til miðskeiðis í 1960-árunum, tá ið Barsskor varð settur í sigling. 1. apríl 1974 yvirtók Strandfaraskip Landsins hesa sigling.

- Tað skal vera mín vón, at Sam – hóast talan ikki er um eitt nýtt skip – fer at roynast líka væl, sum tey skip og teir bátar, sum higartil hava røkt hesa farleið, segði Bjarni Djurholm.

## Politiskur vilji

Í røðu síni legði hann dent á, at sitandi landsstýri hevur sett sær sum mál at betra um viðurskiftini á útoyggj.

- Ásannast má, at eitt væl útbygt og væl virkandi samferðslukervi – við vegum, tunlum og ferjulegum – hevur alstóran týdning fyri trivnaðin í útjaðaranum, fyri vinnuna og fólkið sum heild. Alt verður ikki gjørt eftir einum degi, men Kalsoyggin er eitt dømi um politiskan vilja tvørtur um floksmørk at betra um viðurskiftini hjá fólki á útoyggj.

Bjarni Djurholm segði, at byggingin av samferðsluhavnini í Kalsoynni hevur gingið væl, síðan verklagslógin varð samtykt í løgtinginum, 13. februar 2003.

- Men byggingin hevur verið nakað darvað av veðri og vindi, legði hann aftrat.

Landssýrismaðurin nýtti at enda høvið at takka øllum, sum eiga lut í verkætlanini, Landsverki, ráðgevum, arbeiðstakarum, arbeiðsfólki, strandferðsluni og játtandi myndugleikunum.

- Uttan tykkum var henda verkætlan verandi ein tanki. Tit hava gjørt tankan til veruleika – og hava flutt okkum fram á leið, segði Bjarni Djurholm.



# Kalsoyingar eru nú nærri meginøkinum

**Borgarstjórin í Húsar kommunu, segði seg vóna, at nýggja ferjusambandið kemur at føra til framburð í oynni, samstundis sum sambandið við bygdirnar norðanfyri verður nógv betur**

KALSOYGGIN
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Magni Garðalíð, borgarstjóri í Húsar kommunu, sum eisini fevnir um Syðradal, helt í røðu síni fyri, at hetta er ein stórur dagur fyri alla Kalsoynna.

- Vit hava glett okkum ómetaliga nógv til hendan dagin, og nú stendur samferðsluhavnin liðug, samstundis sum eitt nýtt tíðarskeið er byrjað fyri kalsoyingar. Vit kunnu siga, at vit í dag eru nærri meginøkinum, enn vit áður hava verið.

Hann vísti á, at samstundis, sum hetta er ein hátíðardagur í oynni, er tíðin eisini komin til at siga Barskor farvæl – rutubátinum, sum hevur verið álitið hjá kalsoyingum í fleiri ártíggjur.

- Vit fara at sakna ta samveru, sum hevur eyðkent túrarnar um Kalsoyarfjørð og teir menn, sum hava siglt við Barskor. Eingin nevndur, eingin gloymdur. Tøkk skulu tit eiga fyri hesa tíðina!

Magni segði seg vóna, at nýggja ferjusambandið kemur at føra til framburð, samstundis sum sambandið við bygdirnar norðanfyri verður nógv betur.

- Tað er lættari at draga eina línu í felag heldur enn, at tvær verða drignar av færri.

Hann nam eisini við kjakið um kommunusamanlegging, nú tær báðar bygdirnar norðanfyri hava lagt saman við Klaksvíkar kommunu, meðan Húsar kommuna framvegis er sjálvstøðug kommuna.

- Nú er møguleiki at koma og fara við bili. Fólk, sum hava tilknýti til oynna, men ikki dagliga eru her, fara ivaleyst at vitja oftari, nú túratalið er fleirfaldað.

Magni takkaði teimum, sum standa aftanfyri hesa verkætlan – og ikki minst vendi hann sær til teirra, sum hava arbeitt hjá J&K Petersen, arbeiðstakara.

- Tykkum, sum hava havt tykkara dagliga arbeiði her norðuri, vil eg takka fyri dugnaskap. Dagurin hevur mangan verið rokasligur, og ikki altíð hevur tykkara arbeiði verið heilt vandaleyst.

Borgarstjórin segði seg vóna, at asfalt beinanvegin verður lagt á havnalagið, soleiðis at økið verður nossligari og lættari at ferðast eftir.

Magni Garðalíð takkaði eisini Klaksvíkar kommunu og Landsverki fyri, at tey vildu standa saman við Kalsoynni um hátíðarhaldið.

- Eftir samkomuna her á nýggja havnalagnum bjóða Húsar kommuna og Klaksvíkar kommuna øllum hjartaliga vælkomnum heim til Húsar til døgurða í bygdarhúsinum.

Borgarstjórin endaði við hesum orðum:

- Seinast av øllum vilja vit bjóða Sam hjartaliga vælkomnum og takka Barskor fyri tíðina og trúskap hesi mongu ár, nú hann skal syngja sín svanasong, segði Magni Garðalíð.

# um møguleikum

strandferðsluni, og hvørjar møguleikar nýggja ferjulegan og nýggja ferðasambandið kemur at hava fyri kalsoyingar.



*Andras Jensen, deildarleiðari hjá SL, greiddi frá leikutinum hjá strandferðsluni og teimum møguleikum, sum nýggja farleiðin kemur at geva kalsoyingum*

*Mynd: Bárður Lydersen*